TAKS

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
TINGANES
POSTBOX 2039
110 TÓRSHAVN
Føroyar

Dagfest: 6. juli 2017
J.nr.: 17/18889-2
P-tal/V-tal:
Títt skriv:

Stílað Bjarna A. Bjarnason

**Kanning av málsgongdini hjá TAKS í málinum um skattafrádráttin hjá Eik**
*– viðmerkingar hjá TAKS til Fíggjarmálaráðið*

TAKS hevur sunnukvøldið, 2. juli 2017, fingið kanningina hjá Bárði Larsen, bráðfeingisstjóra á TAKS, dagfest 30. juni 2017, frá Fíggjarmálaráðnum. TAKS hevur fingið høvið at koma við viðmerkingum til kanningina innan fríggjadagin, 7. juli 2017.

TAKS hevur hesar viðmerkingar.

**Straksfrádráttur**
Í kanningini innleiðir bráðfeingisstjórin við, at hann skal kanna "...skattafrádráttin, sum TAKS fyrst játtaði Eik (núverandi Betri Banka) 30. juni 2015 og síðani broytti 3. februar í 2017." Eins og tað í niðurstøðuni á blaðsíðu 3 framgongur, at "TAKS 30. juni 2015 valdi at játtað skattafrádrátt fyri 477 mió. kr. sum skattligt goodwill...".

Tá ein lesur kanningina framgongur, at bráðfeingisstjórin hevur ta fatan, at TAKS hevur viðgjørt og góðkent viðmerkingarnar, sum komu frá Eik í sambandi við ætlanarskrivið, dagfest 22. juni 2015.

TAKS hevur ikki játtað Eik ein skattafrádrátt 30. juni 2015. Tvørturímóti strikaði TAKS tá tann straksfrádráttin, sum Eik hevði tikið sær á 477 mió. kr.

Gongdin var tann, at 22. juni 2015 sendir TAKS eitt ætlanarskriv til Eik, har sagt verður frá, at TAKS ætlar at hækka skattskyldigu inntøkuna fyri 2011 við 477 mió. kr., av tí at TAKS ikki góðkennir (straks)frádráttin, sum Eik hevði tikið sær í sambandi við innlating av sjálvuppgávuni fyri 2011.

Í sama skrivi varð boðað frá, at TAKS metti, at undirbalansan skuldi viðgerast sum goodwill sambært § 35a í skattalógini, og heitt varð á bankan um at

Skálatrøð 20
Postrúm 2151
110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel 35 26 00
taks@taks.fo
www.taks.fo

virðismeta goodwill. Í ætlanarskrivinum fekk Eik eina freist til innan 30. juni at koma við viðmerkingum.

Tá ongar viðmerkingar vóru komnar til hetta ætlanarskriv, sendi TAKS 30. juni 2015 eitt broytingarskriv til Eik, har boðað varð frá, at skattskyldiga inntøkan var hækkað við 477 mió. kr. Í avgerðini hjá TAKS varð støða ikki tikin til virðið av goodwill, men biðið varð um, at Eik gjørdi virðið av goodwill upp.

Seinni sama dag, sum TAKS hevði sent Eik broytingarskrivið, t.e. 30. juni 2015, sendi Eik eitt teldubræv til TAKS við broyttum sjálvuppgávum fyri árini 2011, 2012 og 2013 og við fylgiskrivi, har Eik greiðir frá meting síni og ger upp skattligt goodwill til 477 mió. kr., sum verður deilt yvir 10 ár samsvarandi § 35 a í skattalógini. Hesar viðmerkingar vórðu sendar við teldubrævi, eftir at TAKS hevði sent broytingarskrivið 30. juni 2015.

Frá tí degi, at Eik sendi broyttar sjálvuppgávur fyri árini 2011, 2012 og 2013, byrjaði ein fyrningarfreist upp á 3 ár hjá TAKS at taka endaliga støðu til skattafrádrátt hjá Eik fyri goodwill fyri skattaárini 2011, 2012 og 2013.

Á blaðsíðu 10 í kanningini vísir bráðfeingisstjórin til viðmerkingar frá Eik, dagfestar 29. juni 2015. TAKS skal gera vart við, at hesar viðmerkingar, sum omanfyri nevnt, vórðu ikki sendar til TAKS fyrr enn aftaná, at broytingarskrivið varð sent 30. juni 2015. TAKS móttók hesar viðmerkingar við teldubrævi 30. juni 2015, tveir tímar aftaná at broytingarskrivið við teldubrævi varð sent til Eik.

Tískil hava viðmerkingarnar hjá Eik, móttiknar á TAKS 30. juni 2015, til ætlanarskrivið frá 22. juni 2015 og til broytingarskrivið frá 30. juni 2015 ongantíð verið partur av málsviðgerðini millum ætlanar- og broytingarskrivið, tí tær eru sendar til TAKS aftaná, at TAKS hevur sent broytingarskrivið til Eik.

Sjálvuppgávan fyri 2014, sum skuldi latast TAKS innan 1. juli 2015, verður latin sum vanligt, og har er 1/10 av goodwill drigin frá skattskyldigu inntøkuni.

TAKS hevur tískil ongantíð játtað Eik frádrátt fyri goodwill á 477 mió. kr. Talan er tvørturímóti um ein frádrátt, sum Eik tók sær í sjálvuppgávuni fyri skattaárið 2011, og sum TAKS broytti við broytingarskrivinum frá 30. juni í 2015.

Ein afturkalling av avgerðini frá 30. juni 2015 vildi tí viðført, at støðan var hin sama sum frammanundan broytingarskrivinum frá 30. juni 2015, og hetta hevði



Skálatrøð 20
Postrúm 2151
110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel 35 26 00
taks@taks.fo
www.taks.fo

havt við sær, at Eik fekk ein samlaðan skattligan frádrátt á 477 mió. kr. (straksfrádráttur) fyri 2011.

Bráðfeingisstjórin skrivar á blaðsíðu 23 í kanningini, at "onki bendir sostatt á, at stigið til uppafturtøku stavar frá øðrum enn kreftum uttanhýsis í mun til TAKS." Sum nevnt omanfyri, viðgjørdi TAKS ikki viðmerkingarnar frá Eik frá 30. juni 2015 við virðisáseting av goodwill til 477 mió. kr. beinanvegin, tí broytingin fyri 2011, ið strikaði straksfrádráttin upp á 477 mió. kr. og hækkaði skattskyldigu inntøkuna við 477 mió. kr., varð gjørd við broytingarskrivinum frá 30. juni 2015. Tí var ikki bráðneyðugt at taka støðu til hetta beinanvegin. Harumframt kemur, at ein fyrningarfreist á 3 ár byrjaði, tá ið broyttu sjálvuppgávurnar fyri skattaárini 2011, 2012 og 2013 vórðu latnar inn.

Hóast tað ikki framgongur av skjalaskrásetingini, so viðgjørdi TAKS innanhýsis, hvussu virðismetingin frá Eik av goodwill skuldi viðgerast – herundir um neyðugt var við serkønari hjálp til viðgerðina. Ynskiligt hevði verið, at henda innanhýsis viðgerð varð skjalfest.

**Goodwill**

Á blaðsíðu 4 í kanningini skrivar bráðfeingisstjórin soleiðis:

> "Hóast ikki nógv er at finnast at prosessuelt og í mun til gjølliga málsviðgerð í seinnu fasuni, so kemur niðurstøðan hjá TAKS 3. februar 2017 heldur óvart á. Niðurstøðan er, at tað var rætt at viðgera málið sum mál um skattafrádrátt fyri good-will, men at good-willið skuldi setast til 0 kr, og tískil var ongin skattafrádráttur. Í mun til good-will sum hugtak – eitt meirvirði sum tann parturin av keypsprísi, ið fer upp um virðið á nettoaktivunum – gevur hetta ikki so góða meining, og spurningurin er, um niðurstøðan ikki heldur skuldi verið, at onki good-will var upprunaliga, og at avgerðin 30. juni 2015 tí var skeiv, bleiv afturtikin og nýggj avgerð sett í staðin."

Fatanin hjá TAKS er, at endaliga avgerðin, dagfest 3. februar 2017, er í samsvari við svarið hjá SKAT til Fíggjarligt støðufesti, dagfest 10. desember 2010, viðvíkjandi "vejledende udtalelse vedr. opgørelse af skattemæssige anskaffelsessummer, herunder goodwill" j.nr. 16/08902-25.

Hartil er tað fatanin hjá TAKS, at niðurstøðan samsvarar við úttalilsið hjá SPEKT um goodwill til nevndarfund í Eik tann 27. januar 2016, j.nr. 16/07619-10



Skálatrøð 20
Postrúm 2151
110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel 35 26 00
taks@taks.fo
www.taks.fo

TAKS

(blaðsíða 35-39), sum er skrivað út frá úttalilsi hjá serfrøðingum hjá PwC, dagfest 14. januar 2016, j.nr. 16/07619-10 (blaðsíða 3-13).

Brot úr úttalilsinum hjá SPEKT til nevndarfund í Eik 27. januar 2016:

[redacted]

TAKS heldur, at framhaldandi niðurstøðan hjá bráðfeingisstjóranum um, at "talan er um eina eitt sindur tilgjørda konstruktión, ið tað er lítið av veruleika aftanfyri," byggir á eina fatan av, at goodwill ikki kann gerast upp til kr. 0, eins og at TAKS skal hava játtað frádrátt fyri goodwill á 477 mió. kr. yvir 10 ár í juni 2015.

TAKS kennir seg ikki aftur í hesum og skal viðmerkja, at fyri at koma til at ongin skattafrádráttur er, so skal myndugleikin ítøkiliga meta um skattliga virðið av undirbalansuni sambært § 35 a í skattalógini saman við rundskrivi nr. 1 frá 2007 um goodwill-virðisáseting og virðismeta goodwill til kr. 0.

Harafturat hevur TAKS ikki viðgjørt ella játtað skattliga virðið av goodwill á 477 mió. kr., sum Eik læt TAKS aftaná, at broytingarskrivið frá 30. juni 2015 var sent.

**Sektarspurningurin**

TAKS er samt við bráðfeingisstjóran í, at § 139 í skattalógini eisini fevnir um tað, sum í bókmentum verður nevnt fiktiónsteoriin í merkingini, at skattgjaldarin heldur upplýsingum aftur og/ella teknar eina misvísandi mynd av málinum fyri myndugleikanum.

Tað, sum hjá TAKS verður tikið við í viðgerðina av einum møguligum revsimáli, er, um talan hevur verið um skeivar ella villleiðandi faktuellar upplýsingar, sum eru grundarlagið undir viðgerðini av skattafrádráttinum. Subjektivar metingar, sum borgarar ella ráðgevar hava um eina skattliga viðgerð, hevur TAKS ikki mett hava týdning í sambandi við revsimál eftir § 139.

Bráðfeingisstjórin mælir í niðurstøðuni til, at málið verður latið fútanum til støðutakan. TAKS tekur tilmælið til eftirtektar.

Skálatrøð 20
Postrúm 215
110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel 35 26 00
taks@taks.fo
www.taks.fo

TAKS

**Aðrar viðmerkingar**
Bráðfeingisstjórin vísir í kanningini á, at viðgerðin fram til avgerðina 30. juni 2015 er merkt av fyrisitingarrættarligum manglum. TAKS tekur hetta til eftirtektar og loyvir sær at vísa á, at TAKS longu í sambandi við viðgerðina fram til avgerðina 3. februar 2017 hevur betrað um hesi viðurskifti, eins og bráðfeingisstjórin vísir á.

Eyðun Mørkøre
stjóri, TAKS

Skálatrøð 20
Postrúm 2151
110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel 35 26 00
taks@taks.fo
www.taks.fo

**Uppfylgjandi spurningar til TAKS hin 14. Juli 2017**

TAKS hevur í skrivi, dagfest 6. juli 2017, sent Fíggjarmálaráðnum sínar viðmerkingar til kanningina hjá Bárði Larsen í sonevnda Eik-málinum.
Í viðmerkingunum hjá TAKS verður á síðu 4 niðast m.a. sagt:

"*Tað, sum hjá TAKS verður tikið við í viðgerðina av møguligum revsimáli, er, um talan hevur verið um skeivar ella villeiðandi faktuellar upplýsingar, sum eru grundarlagið undir viðgerðini av skattafrádráttinum. Subjektivar metingar, sum borgarar ella ráðgevar hava um eina skattliga viðgerð, hevur TAKS ikki mett hava týdning í sambandi við revsimál eftir § 139*".

Fíggjarmálaráðið fer at biðja TAKS skjótast gjørligt og í seinasta lagi mánadagin, tann 17. juli 2017, kl. 12.00 greina hetta nærri.

Áheitanin er m.a. grundað á,
- at tað í kanningini verður staðfest, at EIK hevur afturhildið týðandi upplýsingar fyri TAKS
- at TAKS sambært pkt. I í rundskrivi nr. 7 frá 10. november 1998 um fyrisitingarligar sektarásetanir fyri brot á § 139 í skattalógini, ikki hevði heimild til at avgera málið fyrisitingarliga

---

SVAR frá TAKS hin 16. Juli 2017

Tá TAKS hevur mett um, hvørt talan er um sektarmál ella ikki, hevur TAKS lagt dent á, um skattgjaldarin hevur latið TAKS allar faktuellar upplýsingar um relevanta málið soleiðis at TAKS hevur møguleika fyri at taka støðu til, hvussu skattgjaldarin skal setast í skatt.

TAKS hevur hinvegin ikki sett krav um, at skattgjaldarin skal upplýsa um, hvørjar metingar ráðgevarar hjá skattgjaldaranum hava av tí spurninginum, sum er til viðgerðar.

Tá støða varð tikin til, um tað í hesum málinum var talan um eitt sektarmál, metti TAKS, at Eik hevði latið TAKS allar faktuellar, herundir roknskaparligar upplýsingar.

Tað hevur ikki verið siðvenja hjá TAKS at krevja samskifti við grannskoðarar og aðrar ráðgevar hjá skattgjaldaranum sum part av viðgerðini av skattamálum og tí metti TAKS upprunaliga ikki, at talan var um eitt sektarmál.

Tá TAKS ikki metti at talan var um brot á § 139 í skattalógini var tí heldur ikki relevant at taka støðu til, um málið kundi viðgerast fyrisitingarliga.

Um mett varð, at talan var um eitt sektarmál, er greitt, at støddin á frádráttinum, sum málið snúði seg, hevði gjørt, at tað sambært rundskrivinum ikki kundi verið avgreitt fyrisitingarliga, men hevði verið sent fútanum til støðutakan og víðari viðgerð.

**Eyðun Mørkøre**

---